Antares, vit sum arbeiða uttanlanda.
http://www.antares.fo, tpost: antares@antares.fo

Viðmerkingar til Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin) (Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækkan av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

Lógaruppskotið §1, nr. 1:

Broyting í §2, stk. 1 c) "Lønarinntøku, sum ikki er A-inntøka, fyri arbeiði, útint í Norðurlandi, og sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjað í Føroyum."

Viðmerking:

Tað tykist ógreitt í almennu fyrisitingini, hvør er sosialt tryggjaður í øðrum norðurlandi og harvið ikki sosialt tryggjaður í Føroyum. Tað hava vit sæð fleiri dømir um síðstu árini. Tí gevur henda orðing onga meining uttan so at hugtakið er allýst. Flestu føroyingar, sum arbeiða í øðrum norðurlandi, gjalda sosial gjøld har og eru soleiðis sosialt tryggjaðir har, eins og arbeiðsgevari teirra rindar sín part. Men almennu viðmerkingarnar umrøða bara eitt serstakt mál um eina serstaka fyritøku, ið ikki kann samanberast við tey, sum arbeiða í øðrum norðurlandi, fyri ein arbeiðsgevara har og báðir partar rinda sín part at sosialum gjøldum.

Er ikki nágreiniliga lýst hvør er sosialt tryggjaður í Føroyum og hvør er tryggjaður í øðrum norðurlandi og reglurnar eru púra greiðar fyri bæði borgarum og fyrisitingini, kann væntast at nógv stríð kann standast av ásetingini.

Lógaruppskotið §1, nr. 5:

§ 7, stk. 2: "Persónar, sum sbrt. ásetingum í millumtjóðasáttmála eru sosialt tryggjaðir í øðrum landi, eru undantiknir frá gjaldskyldu."

Viðmerking:

Tað er sera umráðandi at tað er púra greitt fyri fyrisitingini og borgarum, hvør kemur undir hesa áseting. Í fleiri ár hevur eitt satt eljustríð verið um hetta millum borgarar og fyrisitingina.

Harafturat er umráðandi at leiðreglur og mannagongdir fyri undantøk verða gjørd áðrenn møguligar lógarbroytingar fáa gildið. Vit hava sæð í líknandi skipanum at tilgongdin er tilvildarlig og at tað kan taka ár at koma fram til eina viðgerð av umsøknum, ið ikki tekur ovurhonds nógva tíð og orku.

§8a, ið ætlanin er at strika, hevur eina áseting um umsókn um frítøku. Men harumframt má eisini vera ein mannagongd og ein leiðregla um hvussu søkjast skal, hvat skal skjalprógvast og hvørji krøv skulu lúkast.

Antares, vit sum arbeiða uttanlanda.
http://www.antares.fo, tpost: antares@antares.fo

Um viðmerkingarnar til uppskotið:

Í 1.2. Galdandi lóggáva verður sagt at føroyingar kunnu fáa frítøku frá gjaldið til sosialu skipanina í Noregi.

Hetta er ein sannleiki við fyrivarnum. Í "Forskrift om unntak fra medlemskap i folketrygden for person som er omfattet av eller mottar ytelser etter utenlandsk trygdelovgivning mv og vedkommendes familiemedlemmer", er heimild til at geva tíðaravmarkaða frítøku í 12 mánaðir.

"Lov om folketrygd" hevur eisini sera avmarkaðar heimildir fyri frítøku.

Tað verður sjáldan hildið at vera ein fyrimunur at søkja frítøku, tí útgjald til t.d. eftirlønir, ið eisini er tengt at limagjaldinum, er væl størri í Noregi enn í Føroyum. Fær ein føroyingur sosialt gjald úr Noregi, kann hann ikki eisini fáa sama, ella tilsvarandi, gjald úr Føroyum samstundis. T.d. kann ein føroyingur, sum fær fólkapensjón úr Noregi, ikki eisini fáa fólkapensjón í Føroyum.

Í praksis er tað soleiðis at um ein søkir frítøku fyri at gjalda limagjald til folketrygd, vil tað áleggja arbeiðsgevaranum skyldur, ið fáir teirra eru sinnaðir at átaka sær. Tí vil hetta ofta viðføra uppsøgn. Serliga í truplum tíðum, har útlendsk arbeiðsmegi ikki er heilt so væl sædd í Noregi, er skjótt til at føroyingar missa arbeiðsplássini og ringt er at fáa tey aftur.

Tað er ferð eftir ferð staðfest at føroysk arbeiðsmegi uttanlands, er eitt eyka bein at standa á hjá føroyska búskapinum. Tí eiga lóggevarar at vera varnir við at máa støðið undan hesum virksemi.

Í viðmerkingunum verður eisini róð fram undir at t.d. norskir arbeiðsgevarar skulu rinda sín part í føroysku ALS skipanina.

Tá broytingar vóru framdar í eftirlønarlógini á leið 2012-13, varð eisini róð framundir at áleggja donskum arbeiðsgevarum skyldur í eftirlønarlógini.

Tá ásannaði fíggjarmálaráði at ikki bar til at lóggeva fyri útlendskar borgarar og fyritøkur í útlandinum og gekk frá tí. Sama mann vera galdandi enn og fyri ALS lógina eins og fyri eftirlønarlógina.

Áhugafelagið Antares vil hervið heita á landsstýrismannin um at gera nágreiningar til hugtøkini nevnd omanfyri og at endurskoða viðmerkingarnar, so tær samsvara við tann veruleikan, ið vit arbeiða undir.

Við teimum fyrivarnunum taka vit undir við broytingunum.

Vegna Antares

Dánjal Jákup Meinertsson, form.